Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eyðgunn Samuelsen, løgtingskvinna

Svarari: Súsanna Bertholdsen, landsstýriskvinna í heilsumálum

Evni: Um bíðilistar og bíðitíðir í Sjúkrahúsverkinum

Spurningar:

1. Við hvussu nógvum persónum eru bíðilistarnir í Sjúkrahúsverkinum styttir við serstøku játtanini, sum varð latin til endamálið á fíggjarlógini fyri 2024?

2. Á hvørjum serøkjum eru bíðilistarnir serliga styttir, og hvussu hevur játtanin ávirkað bíðitíðina á hesum serøkjum?

Viðmerkingar:
Bíðitíðirnar at sleppa til viðgerð á sjúkrahúsunum eru drúgvar á fleiri økjum. Hóast gongdin í Sjúkrahúsverkinum seinnu árini hevur verið góð, og vit hava fingið fleiri serlæknar og onnur heilsustarvsfólk, so eru framvegis seløki, har tørvurin er størri enn starvsfólkatilfeingið. Tí hava vit bíðilistar. Eru bíðilistarnir langir, hevur tað ávirkan á, hvussu leingi fólk bíða til at sleppa í viðgerð.

Í samráð við táverandi landsstýriskvinnu í heilsumálum setti Fíggjarnevndin 4,3 mió. kr. av á fíggjarlógini fyri 2024 til eina serstaka upphædd fyri at fáa bíðilistarnar niður á øllum teimum trimum sjúkrahúsunum. Talan var um eina játtan, sum var markað til endamálið. Tað vóru sjúkrahúsini í felag, sum skuldu skipa fyri og leggja til rættis soleiðis, at bíðilistarnir vórðu styttir mest møguligt við serstøku játtanini.

Sjúkrahúsverkið boðaði í vetur frá, at tá vóru bíðilistarnir styttir við sløkum 600 persónum, og eftir ætlan fóru bíðilistarnir at verða styttir við tilsamans 1.100 persónum við ársenda í 2024. Enn eru tó eingi endalig tøl almannakunngjørd. Fyri at fáa greiðu á, hvussu og í hvønn mun átakið eydnaðist, verða hesin fyrispurningur settur landsstýriskvinnuni í heilsumálum.

Á Løgtingi, 28. februar 2025

Eyðgunn Samuelsen